# Ein Perla í býnum

Fyri tey ið dáma væl at eta ein góðan bita og samstundis hava tað besta útsýnið yvir Reykjavík, er Perlan staðið.

"Ein glæsilegasta bygging Reykjavíkur á daginn, eitt besta veitingahúsið á kvöldin".

Soleiðis verður tikið til um Perluna, sum er ein verulig perla fyri býin.

Perlan liggur á eini høvd í íslendska høvuðsstaðnum, og telist millum tey støðini, ið eru mest vitjað av ferðafólkum.

Av fyrstu tíð var her talan um ein vatnbrunn, men sum táverandi borgarstjórin í Reykjavík, Davið Oddsson fekk í 1991 bygt ein bygning sum í dag hýsur bæði matstovu og kafeteria.

Bygningurin er dekkaður av eini glaskúlu, sum saman við staðsetingini ger sítt til at Perlan er eitt stað, higar fólk í hópatali leita sær.

Ein av vatnbrunnunum er tømdur og er í dag umskapað til eitt søgusavn. Her verður søgan um íslendsku saga'irnar søgd og víst verður, hvussu íslendingar livdu fyrr og nú.



ÚTSÝNI

*Sjáldsama gott útsýni er av Perluni út yvir íslendska høvuðsstaðin*



SNØGT

*Nógv er gjørt burturúr tí arkitektoniska í Perluni*


